

við allari nýmótans tekniskari útgerð, og tað ber eisini til at senda beinleiðis úr bussinum sjálvum. Á sínum mongu ferðum kring landið í summar hevur Summarleiðin í flestu førum havt nýggja bussin við sær, og tað hevur gjørt tað munandi lættari hjá manningini á sendingini at senda til Føroya fólk, tí at hann er so væl útgjørdur.

## Missiónshús og pappírsskurður

Tá ið tað er farið at nærkast døgurða henda mikudagin, vit vitja sendingina, er tíðin komin til at seta kós móti bygdini, har sendast skal frá.

Summarleiðin hevur fingið ein bil frá bilasøluni hjá Meinhard Arge, og í eyðkenda bilinum verða seinastu avtalurnar fingnar upp á pláss, meðan koyrt verður inn á Toftir.

Skráin fyri vitjanina á Toftum er fjølbroytt, tí vitjast skal bæði hjá listafólki, í missiónshúsinum og á Svangaskarði, har teknikk-bussurin kemur at standa, meðan sendingin er í luftini.

Manningin hendan dagin telur tríggjar útvarpsmenn, Elis Poulsen, Kára Sólstein og Øssur Egholm og tøkningin Suna Selfoss. Teir báðir Øssur og Suni halda til á Svangaskarði í teknikk-bussinum, meðan Elis og Kári ferðast runt í Tofta bygd og práta við fólk.

Vit fara í hølunum á teimum báðum reportarunum, og um tú skalt fylgja við teimum, ræður um at skunda sær.

Sent verður beinleiðis, og tí ræður um at verða klárur á staðnum við teimum fólkum, ið prátast skal við, tá ið farast skal í luftina.

Teir báðir reportararnir vitja eitt nú í snotuliga missiónshúsinum á Toftum, har teir millum annað hava sett einum parti av kórinum hjá missiónshúsinum stevnu. Kári Sólstein, sum tekur sær av tekniska partinum hjá teimum báðum reportarunum, skundar sær at rigga til, soleiðis at sangurin skal ljóða so væl sum gjørligt í útvarpinum.

So skjótt innslagið úr missiónshúsinum er liðugt, skunda teir báðir reportararnir sær út um, har formaðurin í teknisku nevnd í Nes Kommunu, Súni í Hjøllum, stendur og bíðar. Eitt stutt lag verður spælt millum innsløgini bæði, og tá ið lagið er liðugt verður tosað við Súna um gongdina í Tofta bygd.

Næsta avtalan hjá Elisi og Kára er at kalla í hinum endanum av bygdini, og nú hava teir av álvara skund fyri at náa fram á staðið, áðrenn teir skulu í luftina aftur. Koyrt verður við fullari ferð oman á Rætt, har teir skulu inn á gólvið hjá Hjalmari Olsen.

Hjalmar er gamal sjómaður, sum er upplagstur, og sum nú brúkar nógva tíð sum pensionistur við at skera ymsar myndir úr pappíri. Tað er ikki sørt, at teir báðir reportararnir eru hugtiknir av pappírsskurðinum hjá Hjalmar, og áðrenn leiðin seinni um dagin gongur aftur til Havnar, hevur Elis ognað sær eitt av verkunum hjá Hjalmari.

Klokkan er farin at nærkast fýra, og Summarleiðin av Toftum er við at nærkast endanum. Okkurt innslag er eftir, áðrenn øll manningin aftur savnast á Svangaskarði við bussin, men tað kennist á monnum, at nú er tað mest hektiska farið aftur um bak.

## Ótrúligur blíðskapur

Útvarpsmenninir greiða frá, at allastaðnis har teir koma, er blíðskapurin óførur.

- Vit verða javnan bjóðaðir til kaffi og køkur, har vit vitja, og vit royna eftir besta førimuni at taka av tilboðunum, um vit hava møguleika fyri tí, sigur Elis Poulsen. Hann leggur afturat, at hetta ber illa til, meðan sendingin er í luftini, og tí verður mangan farið inn aftur á gólvið hjá fólki, tá ið sendingin er liðug at fáa sær ein kaffimunn.

Teir báðir greiða frá, at fólk eru ógvuliga hjálpsom, tá ið teir vitja í bygdunum, og tey fáa mangan hentar upplýsningar frá fólki um onkran í bygdini, sum kann verða áhugaverdur at práta við.

Summarleiðin hevur verið ógvuliga víða í summar, og tað er bert onkur hendinga útoyggj, ið enn ikki hevur havt vitjan av útvarpsmonnunum. Hvussu leingi sendingin fer at koyra afturat, var ikki heilt greitt, tá ið vit vitjaðu sendingina, men væntandi steðgar hon um hálvan september mánað.



*Tað ljóðaði sera væl, tá ið limir úr kórinum hjá missiónshúsinum á Toftum sungu beinleiðis í sendingini.*



*Formaðurin í teknisku nevnd í Nes Kommunu, Súni í Hjøllum, greiðir Elisi og Kára frá um gongdini í Tofta bygd*



*Nú ræður um at skunda sær inn til Hjalmar Olsen, áðrenn teir skulu aftur í luftina*



*Tað fór at dryppa undan bilinum hjá Summarleiðini, tá ið farast skuldi aftur til Havnar, men tað vísti seg, at orsøkin var tann, at bilurin hevði koyrt í ein oljuhyl, og tí var einki galið við sjálvum bilinum*



*Hóast Elis legði seg á knæ, dugdi hann ikki at finna út av, hví tað dryppaði undan bilinum.*